# Fótbóltshøll á Lambareiði



– Fyrst og fremst, so mugu vit sjálvir gera okkum greitt, hvussu vit ætla at umsita pengarnar, sigur formaðurin í FSF, nú UEFA hevur ætlanir um at lata føroyingar fáa 12 mió kr. at ráða yvir

## Mugu fáa reglurnar upp á pláss

**Formaðurin í FSF sigur enn ikki kunna siga nakað ítøkiligt um ella hvussu FSF fer at stuðla einari møguligari fótbóltshøll**

FÓTBÓLTSHØLL

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

»Dreymurin er ein fótbóltshøll«

Hetta var yvirskriftin her á síðunum, tá Dánjal Andreasen fyri nú skjótt tveimum árum síðani setti seg í formansstólin hjá Fótbóltssambandinum. Sjálvur segði Dánjal ta ferðina, at hann helt tað vera alneyðugt við eini fótbóltshøll, skuldi føroyskur fótbóltur mennast munanndi í mun til støðuna í dag, og nú vit skriva heystið 2003, er hetta sjónarmiðið ikki broytt nevnivert.

Tá tosið verður bent inn á ítøkiligu ætlanirnar um eina høll á Lambareiði, tykist føroyski fótbóltsbossurin tó eitt sindur meira varin.

– Enn er tað í øllum førum alt ov tíðliga hjá mær at fara at siga nakað vegna Fótbóltssambandið í so máta. Eg havi hoyrt okkurt graml um hesa høllina, men nakað konkret havi eg so ikki sæð enn. Men talan skal eftir øllum at døma vera um pengar úr HatTrick-grunninum hjá UEFA, og enn vita vit ikki heilt neyvt, hvat hetta inniber, sigur hann.

– Sum eg havi skilt tað, so kunnu vit rokna við, at UEFA yvir eitt fýra ára skeið játtar okkum 12 mió kr., men tað fylgja so eisini treytir við, hvussu hesar pengar verða nýttir.

– Fyrst og fremst, so mugu vit sjálvir gera okkum greitt, hvussu vit ætla at umsita pengarnar. Her hava vit so ikki havt nakran fund enn, men tað verður væntandi soleiðis, at nevndin innan alt ov langa tíð setir sær ein dag av, har vit burturav fara at viðgera hetta málið. Har skal so støða takast til, undir hvørjum formi vit fara inn í verkætlanir. Um talan verður um at veita lán ella stuðul, hvørjar treytir vit seta til eigaraskap og ymisk onnur viðurskifti, sum vit vilja hava heilt greið, áðrenn vit fara í holt við nakra ætlan. Og hartil, so er tað eisini soleiðis, at um vit gera av at fara við í eini slíkari, so skal einstaka verkætlanin eisini góðkennast av UEFA, sigur Dánjal. Andreasen

Spurdur, hvørt tað møguliga verður soleiðis, at FSF fer at nýta alla puljuna til eina høll, soleiðis at hendan kann vera so fíggjarliga trygg sum gjørligt, sigur formaðurin, at tað so eisini er nakað, sum støða skal takast til.

– Men tað er so eisini greitt, at alt hetta eisini má verða gjørt í tráð við tað, sum feløgini ynskja. Nú hava vit so ikki gjørt nakrar reglur enn, men hóast tað kanska er so, at nevndin einsamøll kundi gjørt hesar, so sigur tað seg sjálvt, at feløgini skulu hava avgerandi orðið. Tað eru jú tey, sum eiga Fótbóltssambandið, sigur hann.

– Og so er tað jú eisini tað, at tað væl kann vera, at áhugi er frá fleiri síðum at gera slíka høll. Tað hevur jú fyri ikki so langari tíð síðani verið tosað um eina høll í Sundalagnum, og í Havn vilja tey nokk ikki vera aftan fyri, og alt hetta eru atlit, sum vit skulu taka við, tá vit fara at viðgera málið, sigur Dánjal Andreasen at enda.

**Landsliðsmálverjin, Jens Martin Knudsen, og U-landsliðsvenjarin, Mathias Davidsen, hava í longri tíð arbeitt við møguleikanum um at gera eina fótbóltshøll**

FÓTBÓLTSHØLL

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Vátaslettingurin og fýsandi norðanættin her í november gera sítt til, at fólk fyri tað mesta halda seg innandura, men hjá leikarunum, sum í dag eru til venjingar, ger hetta ikki mun. Allir sum ein díkja leikararnir á við ymsu teknisku venjingunum. »bara ein berøring« verður rópt til sveittandi menninar, sum nú standa í ringi og halda bóltinum uppi. Enn er talan bert um upphiting, men ídnir, sum teir eru, so skerst ikki burtur, at nógv verður lagt fyri kortini. Tað hevur eisini týdning, at vøddarnir verða væl mýktir, áðrenn nærdystirnir á graslíkinum gerast nakað harðari.

### Kann gerast veruleiki

Í dag man omanfyristandandi vera ein fullkomuliga utopisk støða hjá einum venjara at hugsa sær til, men tað verður tó kanska ikki heilt so leingi, áðrenn hetta verður veruleiki.

Seinasta hálva annað árið hava Mathias Davidsen og Jens Martin Knudsen nevnliga arbeitt miðvíst fram ímóti møguleikanum at gera ein fótbóltshøll her í Føroyum, og nú eru ætlanirnar so smátt um at gerast somikið ítøkiligar, at bæði staður og tøl kunnu setast á.

Í stuttum kann sigast um ætlaðu høllina, at talan fyrst og fremst verður um eina venjingarhøll. Sambært uppskotinum, so skal hon liggja á Lambareiði, og sum skilst, so hevur Runavíkar Kommuna fingið umbøn um grundstykki. Ætlaða støddin á vøllinum er 40X60 metrar, og tá ber so sjálvandi ikki til at hava dystir í sama líki, sum teir verða leiktir uttandura. Undirlagið á høllini skal vera graslíki av sama slag, sum vit kenna tað frá nýggju vøllunum, sum seinastu tvey árini eru lagdir kring landið,

### Steðgurin skal styttast

Teir báðir, Mathias og Jens Martin, eru á ongan hátt ókendir í føroyskum fótbóltshøpi.

Gjøgnum mongu ár síni á landsliðnum er Jens Martin ivaleyst tann av teimum, sum er best kendur millum manna, og hann hevur ofta haft á munni, at skulu føroyingar lyfta seg enn meira á altjóða fótbóltspallinum, so er neyðugt at leingja kappingina.

Eitt nú segði hann her í blaðnum eftir seinasta landsdystin í júst lidnu undankappingini, at Føroyar nú eru komnar hartil, sum vit kunnu røkka undir verandi formum. At tað er neyðugt, at leikararnir eru aktivir ein størri part av árinum, tí gera vit ikki tað, so verða vit framhaldandi eftirbátar á – serstakliga – tekniska økinum.

Og partamaðurin, Mathias, er als ikki ósamdur í hesum. Gjøgnum mong ár hevur Mathias Davidsen verið partur av venjaraliðnum kring U-landsliðini hjá Føroyum, og tó at úrslitini mangan hava verið á heilt góðari leið, so er hann ikki í iva um, at broyting skal til, um vit skulu longur fram.

– Tað er einki at ivast í, at veðurfrøðiligu umstøðurnar hjá okkum eru ein stór forðing. Sum er liggja flestu leikararnir í dvala frá oktober til januar mánað, og tað er alt ov leingi.

– Vit síggja tað serliga væl á yngru landsliðunum. Har standa vit í nógvar mátar mát við mótstøðuliðini, tá talan er um yngstu landsliðini, men so skjótt vit koma upp eftir á stiganum, verða vit eftirbátar. Tá gerst venjingin hjá hinum nógv meira intensiv og tí menna teir seg nógv meira. Ikki tí at vit ikki útvikla okkara leikarar, men tað gongur bara nógv seinni enn hjá hinum, og tá vit so koma upp til A-landsliðið, er trupulleikin sera sjónskur. Har hava vit ofta bara ein og tveir leikarar, sum hava neyðuga skjótleikan í spælinum til at gera seg galdandi, og tað er ov lítið. Við meira støðugari venjing kundi talan her kanska verið um fýra og fimm leikarar, sum høvdu neyðuga støðið, og tað vildi gjørt stóran mun, heldur hann.

### Fyri øll

Tá tosið aftur verður beint inn á ætlaðu høllina, er Mathias tó ikki heilt so tíðindafróður.

– Jú hatta er ein ætlan, sum vit hava arbeitt við í eina tíð, men enn er nakað eftir á mál. So vit hava ikki vilja gingið alt ov hart við hurðunum. Akkurát, nær vit hava eitt heilt liðugt projekt, er ikki endaliga greitt, men tað sigur seg sjálvt, at tað er neyðugt við parti av føroysku HatTrick-køkuni, um hon skal gerast veruleiki, og tann grunnurin byrjar jú at gjalda út komandi ár.

Onkur atfinning hevur ljóðað úr høvuðsstaðnum, um at Eysturoyggin við eini høll her kann skapa sær eina serstøðu, men hesum er Mathias als ikki samdur í.

– Kemur ein slík høll, so má aðalmálið verða, at allur føroyskur fótbóltur fær gagn av henni. At hon liggur í Eysturoynni er einamest tí, at her eru nógv feløg í heilt stuttari frástøðu, men sjálvandi skulu øll hava møguleika at nýta hana. Eitt nú er neyðugt, at venjingartíðirnar verða samskipaðar, so t.d. HB og B36 møguliga kunnu samskipa ferðingina hjá sær inn her, og hóast alt, so eru tað ikki meira enn trý korter úr Havn til Lambareiði.

Og hartil, so leggur Mathias dent á, at teir á ongan hátt ætla at leggja seg á allan pottin frá UEFA.

– Spyrt tú meg, so ivist eg ikki í, at vit um ikki so nógv ár hava fleiri hallir av hesum slagnum. Og hvør veit. Eini 10 ár fram í tíðina hava vit kanska eisini eina høll í fullari stødd. Hana hava vit ikki møguleika at gera her og nú, tí kostnaðurin verður alt ov stórur til bæði íløgur og rakstur. Men at hon kemur fyrr ella seinni ivist eg ikki í, og tað vil tá vera enn eitt stórt framstig, sigur altso Mathias Davidsen at enda.



*Soleiðis kemur ætlaða høllin at síggja út. Akkurát hvar á Lambareiði hon skal liggja, hava vit ikki fingið upplýst, men her er so ein møguleiki. Tað eru Mathias Davidsen og Jens Martin Knudsen, sum standa aftan fyri verkætlanina*

*Mynd Jens Kristian Vang/ Álvur Haraldsen*

### Fakta



| | |
|---|---|
| Stødd á vølli | 60X40 metrar |
| Stødd á høll | 68X43 metrar |
| Hædd á høll | 4,5 metrar á síðuni |
| | 11,5 metrar á mønuni |
| Undirlag | Graslíki, Polytan Monotex |
| Kostnaðarmeting | 15 mió kr. |

HatTrick grunnurin hjá UEFA er ætlaður at fíggja part av høllini.

Talan er um grunn, sum UEFA setur á stovn við tí endamáli at styrkja um grasrøturnar í fótbóltsspælinum kring Europa. Stovnsfæið í grunninum er 270 mió eurur (2 mia kr.), og fer útgjaldið til ymsu londini fram yvir eitt fýra ára skeið. Fyrstu ferð 1. august 2004 og seinastu ferð 31. august 2008. Parturin til FSF verður væntandi um 12 mió kr.

## Havnin vil sleppa upp í part

Tað er ikki alla staðni, at tíðindini um eina ætlaða fótbóltshøll í Eysturoynni verða eins væl móttikin.

Í øllum førum hevur tað verið tutlað úr høvuðsstaðarfeløgunum, at tey ikki vilja vera við sviðið soð á tann hátt, at tey koma at hava verri umstøður enn eitt nú eysturoyarfeløgini.

Sum skilst, so vóru tey í serliga HB og B36 rættiliga kløkk, tá tey frættu tíðindini um ætlanina hjá teimum báðum eysturoyingunum, og tað bendir eisini á, at feløgini ætla at gera nakað við hetta.

Í øllum førum hava umboð fyri HB, B36 og AB í vikuni heitt á Býráðið um at taka upp samstarv við FSF um møguliga ger av fótbóltshøll.

Okkum kunnugt, so hevur málið tó enn ikki verið til nakra viðgerð í Býráðnum, og spurningurin er so helst eisini, í hvønn mun kommunan hevur ráð at vera feløgunum til hjálpar. Bæði tá hugsað verður um krónur og oyru, men helst eisini tí fótbólturin – einsamallur – ikki hevur eins stóra vælvild frá øllum pørtum av havnarborgarum.

**-jm**